# Bilar

Nr. 229 • hósdagur • 28. november 2002 • 76. árg.



*Avensis innan. Alu-look og alt í evropeiskum stíli.*

# Nýggjur Avensis í vár

*Avensis hevur sportsligar koyrieginleikar í stíl við Toyota Celica*






*Avensis sedan. 2,0 litur dieselmotorurin hevur nýggja umhvørvisliga D-CAT partiksótfiltrið, ið er ein uppfining hjá Toyota.*



*Toyota Avensis stationcar. Designið er smart og heilt í evropeiskum stíli*

**Ein heilt nýggjur Toyota Avensis kemur á marknaðin í vár. Talan er um ein bil, sum onki hevur til felags við forgangaran uttan motorarnar. Designið minnir mest um VW og Audi**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Tá Toyota Carina bleiv til Avensis fyri umleið fýra árum síðan, vóru ikki tær stóru designbroytingarnar at síggja. Hesaferð er talan um ein heilt nýggjan bil.

Tað verður alt meira vanligt at firmabilar og familjubilar hava sportligar koyrieginleikar. Vit hava sæð tað í fleiri av teimum nýggju bilunum, sum eru komnir á marknaðin í seinastuni. Til undirvognin á nýggja Avensis hava Toyota brúkt sama koncept sum til sportvognin Celica. Tað eru ikki einans koyrieginleikarnir, teir hava gjørt nógv burturúr, designið er nýtt og í smartum evropeiskum stíli. Sum vit síggja á myndunum, kundi bilurin fyri tað verið týskur. Avensis er teknaður á ED2-designteknistovuni í Fraklandi, sum eisini hava teknað Yaris og Corolla. Ein nýggjur motorur verður á skránni, tað er ein 2,0 litur dieselmotorur við 116 hk og nýggja umhvørvisvinarliga D-CAT filtrinum, sum minkar munandi um dálkandi útlátið frá útstoytinum. Antispinn verður standard í øllum útgávunum.





# Kendur familjubilur í nýggjari og broyttari útgávu

*At síggja til sær Citroën Berlingo út sum ein heilt nýggjur bilur. Hesin bilurin sum Símun Waag, sølumaður hjá Ivan Johansen sýnir fram, er ein Multispace við 1,6 litur bensinmotori motori og 110 hk*
*Mynd: Jens K. Vang*






*Berlingo innan. Instrumentborðið er broytt við fleiri rúmum at leggja lutir frá sær á*
*Mynd: Jens K. Vang*

**Citroën Berlingo, ið fyrstu ferð kom á marknaðin í 1996, er nú komin í eini nógv broyttari útgávu. Fronturin er nýggjur, instrumentborðið er broytt, og bilurin hevur fingið meira trygdarútgerð**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

At síggja til er tað mest framman, at bilurin er broyttur, men innan er nógv nýtt eisini. Instrumentborðið er broytt og møguleiki til fleiri hyllar og skáp undir loftinum. Berlingo verður gjørdur í útgávunum Advance og Multispace, sum so aftur fáast við meira útgerð so sum aircondition og eini serligari innrættan av loftinum við skápum og ventilationsdysum, sum vit kenna tað frá flogførum. Berlingo er eisini blivin ein tryggari bilur við kraftigari airbagbjølgum, størri bremsuskivum og øðrum innbygdum trygdarskipanum.

Servostýringin er verður ávirkað av ferðini, soleiðis at bilurin er lættari at stýra við lægri ferð, og hon verður tyngri og fastari, tá ferðin veksur. Berlingo fæst við tveimum bensinmotorum við ávikavist 75 og 110 hk og tveimum dieselmotorum við 71 og 90 hk. Viðførisrúmið er so stórt, at ein barnavognur passar inn uttan at skula leggjast saman. Tá baksetrini verða løgd fram, eru heilir 2800 litrar at ráða yvir í viðførisrúminum.

# Reinir diesel og bensinmotorar

**Síðan bilverksmiðjurnar fóru at senda dieselbilar við partikulfiltrum á marknaðin, eru umhvørviskrøvini til dieselmotorar herd munandi. Í 2005 skal útlátið frá dieselmotorunum minkast niður í eina helvt í Evropa**

BILMOTORAR
*Magnus Gunnarsson*

Peugeot vóru teir fyrstu, síðan komu Citroën við dieselmotorum við partikulfilturm. Nú eru Ford og Toyota eisini á veg á marknaðin við umhvørvisvinsarligum og reinum dieselmotorum. Krøvini frá ES eru tey, at frá 2005 skal dálkingin av útlátinum frá dieselmotorunum minkast við eini helvt, av tí tað er í dag. Bilverksmiðjurnar verða tí noyddar at gera nakað við at fáa dieselmotorarnar at dálka minni, um tær ætla at selja bilarnar eftir 2005. Í teimum størru býunum í Evropa er dálkingin ein stórur trupulleiki. Ein kanning hjá Vägverket í Svøríki vísir, at dieselbilar við partikulfiltri hava minka um útlátið av skaðiligum evnunum 100 ferðir. Teir nýggju bensinmotorarnir við beinleiðis innsprænging verða eisini reinari og meira umhvørvisvinarligir. Mitsubishi vóru fyrstir við GDI-motorunum, sum síðan eru útbygdir og betraðir munandi.



*Tað krevur framkomna útgerð at máta partikulútlátið frá dieselmotorunum*

## Car of the Year



Renault Megane II bleiv av 58 motorjournalistar frá 22 evropeiskum londum kosin "Car of the Year 2003". Ein av grundgevingunum var, at Megane II hevur heilt annarleiðis og sermerkt design.

*Kelda: Volvo Personvogne Danmark A/S*

## 9-3 selur væl



Eftirspurningurin eftir nýggja Saab 9-3 er so stórur, at verksmiðjan í Trollhättan klárar ikki at fremleiða nokk av bilum. Væntandi verða 40.000 bilar seldir í 2002, harav størsti parturin fer til USA.

*Kelda: Bil Magasinet*

## NAF dekktest



Norska blaðið Motor gjørdi herfyri eina dekktest, har teir samanbóru vanlig lamelldekk og lamelldekk við píkum. Tað vísti seg at á ísi við 50 km/t, bremsaðu lamelldekkini í summum førum betur enn píkadekkini.

*Kelda: NAF Motor*